LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

**Løgtingið**

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 52/2020 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingsmanni, um Brexit og donsk skip í føroyskari fiskivinnu**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Hvat samskifti hevur verið millum landsstýrið og donsku stjórnina um at loyva donskum skipum í føroyskan sjógv at fiska?
2. Hava løgmaður ella nakað av landsstýrisfólkunum fingið fyrispurningar, áheitarnir ella annað frá donsku fiskivinnuni um málið?
3. Kann løgmaður greiða frá, um donsk reiðarí eiga í skipum, sum í seinastuni eru komin inn í føroysku fiskivinnuna?

**Svar:**

**Til 1 og 2:**

Mær kunnugt hevur ikki verið nakað samskifti verið millum landsstýrið og donsku stjórnina um at loyva donskum skipum í føroyskan sjógv at fiska.

Eg havi eisini spurt meg fyri hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum og landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum um teir kenna nakað til, at donsk skip vilja í føroyskan sjógv at fiska, um tey missa rættindi í bretskum sjógvi. Tað gera landsstýrismenninir ikki. Teir hava heldur ikki fingið fyrispurningar, áheitanir ella annað frá donsku fiskivinnuni um møguliga atgongd til føroyskan sjógv at fiska.

**Til 3:**

Niðanfyri er ein listi við teimum fiskiførum, uttan bólk 5, sum eru skrásett fyri fyrstu ferð í Føroyum síðan løgtingsvalið í september 2019. Tað eru Vørn kunnugt ikki danskir eigarar uppií hesum feløgunum.

Jógvan I FD710 – OW2049:
Skrásettur 1. ferð 02.12.2019. Fyrrv. Atlantic - Ålesund Noreg
Keypari: P/F Eysturoy

Klakkur KG9 – OW2046: Skrásettur 1. ferð 02.01.2020 Fyrrv. Geir II - Eigari tá H P Holmeset AS - Grytastrandvegen 339 -6265 Vatne - Norge.
Keypari: Sp/f Undir Klakki

Gøtunes FD950 – OW2023:

Leigumál frá 29.08.2019 P/F Desin -Fyrrv. Gitte Henning (1) 30.06.2020 broytt navn til Gøtunes
FD950 – OW2023 Keypari: P/F Desin

Kambur FD454 – OW2115: Skrásettur 1. ferð 09.11.2020. Fyrrv. Østerfjord LJPZ - Noreg
Keypari: P/F M&S Strendur

Í Tinganesi, 4. desember 2020

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður